## DAGSINS MEINING

# Frí kapping í sølu má merkja fría kapping í keypi

Tann fría kappingin ger seg ikki galdandi allastaðni í fiskivinnuni. Hvørki í Føroyum ella aðrastaðni. Hyggja vit til dømis at Íslandi, so eru íslendarar óførir at gera íløgur uttanlands, men tá tað kemur til egnu fiskvinnu, so er fullkomuliga stongt fyri útlendskum áhugamálum. Hví man hetta vera so? Kanska er hetta so, tí at fiskivinna verður mett at verða nakað, ið fyri ein og hvønn prís skal vera staðbundið og væl regulerað av stjórnini.

Her í Føroyum hava vit havt eitt kjak, um skip skulu sleppa at landa, har tey vilja, og nú fyriliggur so ein ætlan um at hava eina internetuppboðssølu, har allar bindingar skulu burtur. Hetta eigur at vera søtur musikkur í oyrunum, hjá teimum, ið eiga skipini. Ein frí uppboðssøla, har allar bindingar eru burtur, kann tryggja, at rávøran til eina og hvørja tíð verður seld so dýrt sum møguligt. Hetta skuldi verið gott, ella hvussu?

Trupulleikin er bert, at her manglar eitt element í kjakinum. Um ein reiðari skal sleppa at fylgja eginahugamálum út í odd og egg við at selja til hvønn sum helst, bara prísurin er bestur, so eigur sami reiðari eisini at fylgja marknaðartreytum, tá talan er um at sleppa framat hesum tilfeingi, ið hann vil sleppa at selja uttan bindingar.

Vit hava eina regulerаða fiskivinnu, har tað almenna útskrivar fiskiloyvir, ið mugu metast sum eitt stórt frammihjárættindi, ið ikki verður útboðið eftir marknaðartreytum. Føroya Landsstýri, ið útskrivar hesi loyvi, hevur ikki bert skipini og manningarnar at hugsa um. Føroya Landsstýri hevur eitt heilt samfelag at hugsa um, og tí er tað ikki líkamikið, hvør fær atgongd til rávøruna at virka. Um sølan skal verða púra frí, so má fiskurin á grunnunum eisini seljast púra frítt. Hetta merkir, at kvotur eiga at verða seldar á almennum uppboði. Fríar marknaðartreytir tá reiðarí skulu selja, má eisini merkja fríar marknaðartreytir, ta somu reiðarí skulu sleppa framat tí, ið hesi reiðarí vilja sleppa at selja heilt uttan bindingar.

Tað ber ikki til, at hava søluliðið púra frítt fyri bindingum, um skipini dúva uppá ókeypis almenn frammihjárættindi. Her eiga pseudoliberalistisku tankarnir hjá pørtum av fiskivinnuni at verða justeraðir til veruleikan. Veruleikin er, at um man ynskir eina fiskivinnu púra uttan bindingar í sølu, so mugu bindingarnar eisini burtur í tilfeingisatgongdini, soleiðis at ein og hvør skal kunna bjóða uppá kvotur. Um hetta ikki verður gjørt, so kann landið, og harvið skattgjaldarin sita við sviðið soð, um t.d. rávøra í enn størri mun enn í dag fer beinleiðis av landinum.

Tað verður spennandi at síggja, um hetta er enn eitt dømi um, at partar av fiskivinnuni ynskja at sleppa at fáa marknaðartreytir, tá seljast skal, men vilja framhaldandi verjast móti kapping, tá tað kemur til rávøruatgongd. Slíkt er dupultmoralur, og eigur ikki at góðtakast.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Når præsten taler usandt

**Peter O.K. Olofson**
*Klaksvík*



Gennem de sidste par måneder har vi i SvF onsdag aften kunnet følge serien ‘At tale med Gud’. Repræsentanter for forskellige religioner har i udsendelserne redegjort for, hvad "deres" religion mente om forskellige emner og har besvaret spørgsmål fra seerne. Her var en oplagt mulighed for at lære "de andre" lidt bedre at kende, samtidig med at de ikke-kristne religioners lære blev sat i perspektiv ud fra kristentroen. Det var slet ikke nogen dårlig idé.

Det sku’ vær’ så godt, og så’ det faktisk skidt. Den gennemgående repræsentant for kristentroen taler nemlig ikke sandt. I onsdags (d. 14/4) fortalte hun os, at der ikke fandtes nogen fortabelse, og at Helvedet kun er noget, der hører denne jord til, og som vi selv skaber på denne jord. Tidligere har hun sagt, at homoseksuelt samliv er ok. Registreret partnerskab er fint. Hvorvidt mand og kvinde vælger at leve sammen uden at være gift eller ej, er ikke afgørende. Sjælen får vi først ved fødslen, så derfor kan abort aldrig være mord. Osv.

Egentlig kunne det have været spændende at fremlægge ovenstående udtalelser for en række afrikanske kirkeledere og spurgt dem: Hvilken religion tror I, at den person, der har sagt dette, repræsenterer? Mon nogen af dem ville have gættet på, at det var den evangelisk-lutherske kirke i Danmark, folkekirken?

Den tanzanianske anglikanske biskop Kapinga har begrundet deres brud med Episkopalkirken i USA (EC USA) med følgende ord: "Ved ordination af kvinder forlod EC-USA den katolske fold af kirken (dvs. den blev sekterisk i forhold til almen kristen lære, ordet ‘katolsk’ betyder almindelig, som vi også oversætter det med i trosbekendelsen). Ved bispevielsen af Gene Robinson (der lever i et homoseksuelt forhold) forlod EC-USA den kristne religion." (De indskudte forklaringer i citatet er mine). (‘Kirkelig Information’, Nr. 1, 2004)

Mon ikke den danske præst, Hans Olav Okkels, beholder ret, når han i samme nummer af ‘Kirkelig Information’ skriver: "Meget tyder på, at vi går ind i en periode, hvor kristne fra Afrika må hjælpe de vesteuropæiske kirker at bevare troen og de bibelske ordninger."

Det var ikke helt ved siden af, da den danske præst, Orla Villekær, i den udsendelse, hvor han medvirkede, konstaterede, at der vist ikke blot var nuancer i det, der blev lært indenfor folkekirken men ligefrem forskellige religioner.

Det er nok ikke for ingenting, at Jesus siger: "Tag jer i agt for de falske profeter, der kommer til jer i fåreklæder, men indeni er glubske ulve". Også og især når biskopperne tillader dem at være præster i folkekirken.

# Landsstevnan hjá Javna 2004

TÍÐINDASKRIV

**Lívið**
Sum heitið á árs- og arbeiðsætlan fyri 2004 valdu vit: Lívið og barnaøkið.

Í stevnumiðnum hjá Javna stendur:

Øllum - uttan mun til brek - skal tryggjast sami rættur til lívið.

Hetta varð væl lýst á øllum økisfundunum í mars mánað.

**Spennandi vika**
Í komandi viku hevur Javni fleiri tiltøk á skránni, ið enda við veitslu, har øll eru vælkomin.

Landsstevnan hjá Javna við veitsluni er eitt av hæddarpunktunum í árinum. Eisini aðalfundurin, hægsti mynduleiki felagsins hevur stóran týdning. Tað er henda dagin, ið limirnir kunnu geva til kennar um nevndin er á rættari leið.

**Lógtingsfólk og landsstýrismenn**
Mánadagin skipar Javni fyri temadegi um fólk við menningartarni.

Henda dagin eru politikarnir bodnir at luttaka allan dagin.

Javni roynir at vera á varðhaldi og at vísa myndugleikunum á tørvin hjá teimum við menningartarni frá barni til ellisár.

**Landsstevnan 24.apríl**
Tað verður Maud Wang Hansen, leiðari á Verkstaðnum Vón, ið setur stevnuna á Hotel Hafnia leygardagin klokkan 14.

Á almanna fundinum fer Hans Pauli Strøm, almannaráðharri at røða um bústaðir og arbeiði hjá fólki við menningartarni.

**Aðalfundurin**
Aftaná stuttan steðg við drekkamunni verður aðalfundurin - sambart lógum felagsins - við Peter Even Djurhuus, sum fundarstjóra.

**Veitslan**
Tað er økisnevndin í Vágunum, ið skipar fyri veitsluni, sum verður í Bygdarhúsinum í Miðvági.

Byrjað verður kl. 19, har Jónhild Jørgensen, formaður í felagskommununi bjóðar vælkomin, áftaná spælir orkestrið Ælabogin.

Sum altíð verður skráin spennandi, við døgurða, undirhald og burturlutan.

Gestarøðari verður Eivind Jacobsen, borgarstjóri og gestasangari verður Eivind á Presttrøðni.

Aftaná spæla M’as Blues Band til dans.

Skipað verður fyri busskoyring úr Havn og aftur á kr. 100 fyri hvønn. Tilmelding neyðug!

Kostnaður fyri veitsluna er kr. 200 vaksin, børn 7 - 14 ár kr. 100

Tey, ið ætla sær við mugu skunda sær, tí tilmeldingar freistin er 19. apríl.

Ringjast kann til Javna 314827 ella senda teldupost javni@javni.fo

Øll eru hjartaliga vælkomin

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Føroya Landsstýri skal keypa Fiskamarkna Føroya

**Viðmerking**
*Petur S. Johannessen*

Tað skerst ikki burtur, at tá ið Fiskamarknaður Føroya kom, bleiv tað eitt stórt framstig bæði hvat viðv. góðsku, støddarskiljing og prísi, men síðani tá er lítið ella einki hent, tað einasta sum ikki stendur í stað, er gjaldið fyri tær sokallaðu tænasturnar. Tað vísir seg bara at hækka meðan tænastustøðið ikki fylgir við, alt hetta kann bert Føroya Landsstýrið lastast fyri .

Nú kenni eg best málið frá ráfiskakeyparans síðu, og sigast má at fiskakeyparin hevur ikki ein tann einasta kjans fyri at bera boð um órættvísa viðferð, so sum undirvekt /støddir ella vánaliga góðsku osv.til Fiskamarknaðin Føroya, tí Fiskamarknaðurin er blivin ein monopol fyritøka, og hevur tí ikki tørv á at nýta dýrabæra tíð uppá nakrar smákundar, tí tað almenna hevur tryggjað Fiskamarknaði Føroya fastar inntøkur, og tí nýtist Fiskamarknaðurin Føroya ikki at fara út og selja seg sjálvan fyri at fáa inntøkur, sum annars er fortreytin hjá øllum privatum partafeløgum, og hesi privatu partafeløg hava eittans endamál, og tað er at tjena so nógv sum gjørligt til parteigararnar, einki forgjørt í tí, tí tað er tað sum er høvuðsendamálið, misskilji meg ikki í hesum.

Men tað óvanliga er, at Føroya Landsstýri hevur syrgt fyri at Fiskamarknaður Føroya er í einari tryggari inntøkulegu, við at kunngera, at ein triðingur at veiðini hjá skipunum skal gjøgnum uppboðsølu, og at allur óviðgjørdur fiskur til útflutnings skal gjøgnum uppboðsølu eisini, hetta ger at Fiskamarknaðurin ikki hevur fyri neyðuni at taka sær av smáum kundum og ei heldur hava nakra kundatænastu fyri neyðini, tí inntøkurnar eru nøktandi og tryggar. Tað er bara at hyggja at roknskapinum, jú tað má sigast at parteigarirnir hava satsað rætt og tað skulu teir hava rós fyri, eisini fyri at hava tikið stig til uppboðsøluna, tað var ógvuliga striltið í byrjanini.

Mítt uppskot er at landið átekur sær at keypa Fiskamarknað Føroya, og tryggjar hervið Føroya fólki at hava tær salgskanalir, sum tryggja, at føroyskur fiskur verður skildur, góðskaður og útbjóðaður her heima og altjóða javntstillað soleiðis at samanhang er millum tað, sum kundin vil hava, og tað sum verður bjóðað út, og at tænastan altíð er í top, óansæð um tað er ein lítil ella stórur kundi.

Gjaldið fyri tær sokallaðu tænasturnar er lagt soleiðis til rættis, at hendan uppboðssølan bert skal hvíla í sær sjálvum tvs. hava til viðlíkahald og íløgur men ikki vinning, og tí hava eitt munandi lægri avgjald, men eina tænastu sum er nøktandi og effektiv, soleiðis fær man ein optimalan prís, tí vinningurin er innbygdur í prísin nú, og tá er tað meining í at hava ein triðing yvir uppboðssølu, tí tá fer inntøkanm sum annars skuldi til Fiskamarkna Føroya til at hjálpa um hart trongda kappingaførið hjá okkum øllum, tí hendan uppboðssølan er ikki profitt orienterað, men tænastu/optimerings orienterað. Hetta er tann stóri og avgerðandi munurin, og ikki sum nú, tryggjar vinning til nakrar fáar parteigarar.

Hetta skal verða eitt tænastuorgan, sum tryggjar, at vit altíð fáa tann rætta prísin fyri føroyskan fisk, og at so nógvir keyparar fáa atgongd til føroyskan fisk sum gjørligt, føroyingar og útlendingar. Hetta skuldi sæst aftur við at miðalprísurin hjá skipunum skuldi hækkað, og at fiskakeyparirnir fáa atgongd til nógv meiri fisk enn í dag, og harvið kunnu keypa tað fiskaslag/sløg og stødd/ir teir eru best til at framleiða.

Vit skulu syrgja fyri at útlendingar/føroyingar fáa so góða tænastu og at útboðið er lagt soleiðis til rættis, at øll tey stóru keyparalondini kunnu verða fult við, og at logistikkurin til og úr Føroyum verður optimalur, og sjálvsagt tað sama innanlanda.

Nú er grundarlag fyri at seta totalt forboð at landa uttanlanda, og harvið kann landsstýrið rætta upp aftur tað, sum teir avreiddu til nakrar fáar reiðarar, nevnuliga fiskiloyvini, nú kann tað føroyska fólki fáa nakað aftur í øktum virksemi, av okkara egna fiski.

Hetta vil eg gjarna spyrja Fiskimálaráðharran um, og hvat hann ætlar at gera við hetta, sum er greitt frá omanfyri. Her kann ikki bara standa til, og nú kann landið bera í bøtuflaka og geva partvís aftur, tað sum teir av órættum tóku av ognini hjá Føroya fólki.

Tað eru nakrar tænastur tað almenna skal handfara og taka sær av, og aðrar tænastur, sum tað almenna skal halda seg langt burtur frá, men at uppboðssølan skal verða ein almenn tænasta, meti eg sum eina sjálvfylgju, og sera týdningarmikla uppgávu fyri Føroyar.

Ein annan spurning havi eg afturat til Fiskimálaráðharran: hvat bleiv av flutningsstuðlinum til útjaðaran, og hvussu kemur hann at síggja út. Eg havi eitt uppskot, tað er at lata flutningsstuðul til virkir í útjaðaranum, sum virka fisk ella fiskaúrdráttir og ikki til nakað annað, soleiðis at flutningurin til virkið og til avskipingarhavn verður útjavnaður, ella er ájavnt við miðstaðarøkið. Tá er flutningsstuðulin sera arbeiðsskapandi, og tað er endamálið við flutningsstuðlinum: at verða arbeiðskapandi soleiðis at tað kemur meiri inn í kommunu/lands kassan enn hvat tað almenna letur út í flutningsstuðli.

Og fyri at fáa skil á um Smyril gevur hall ella ikki, verður tað eitt krav, at roknskapurin hjá Smyrli kemur til Suðuroyar, tað skal viðmerkjast, at hjá handilsflotareiðarínum verður tað mesta av roknskapinum gjørt umborð av navigatørunum ella skiparanum, og er hatta nakað, sum skuldi verið hugt eftir hjá landsstýrinum. Her kann sparast lønir ? annars vóni eg at umstingin av Smyrli og kanska øðrum strandfaraskipum við, verða løgd út til Suðuroyar frá 1. januar 2005.

Hetta við at roknskapurin ikki kann sundurskiljast er undanførslur, tað er avgerandi fyri okkum Suðuroyingar, at kostnaðarstøðið til og frá oynni lækkar skjótast gjørligt, og tí vilja vit hava staðfest, um Smyril gevur hall ella ikki, og tí skal roknskapurin gerast í Suðuroynni.




# Grundgevingarnar hjá útvarpi og sjónvarpi halda ikki!

**Johan Petersen**



At útvarpið og sjónvarpið ikki eru óheftir fjølmiðlar, so sum kringvarpslógin áleggur teimum, munnu fá vera í iva um. Eftir politiska skiftið í Tinganesi, har Tjóðveldisflokkurin nú er komin í andstøðu, halda grundgevingarnar ikki fyri framíhjárœttin hjá hesum flokki og teimum sjónarmiðum, hann stendur fyri!

Undir seinasta landsstýri, har Tjóðveldisflokkurin var partur av samgonguni, hava bœði útvarpið og sjónvarpið ført fram, at orsøkin til, at Tjóðveldisflokkurin so ofta kom framat, var, at tað var meiri áhugavert við sjónarmiðunum hjá einum landsstýrisflokki, sum sat við ábyrgd og stjórnaði landinum enn sjónarmiðini hjá andstøðuni.

Atfinningar av loftmiðlunum eru ofta svaraðar aftur við, at líka so nógvir tjóðveldismenn finnast at miðlunum sum sambandsmenn - eitt páhald, sum ikki letur seg eftirkanna, tí bert loftmiðlarnir kenna hesar atfinningar.

**Vent í holuni - og tó**
Nú er tó vent í holuni, hvat íð viðvíkur flokkum í landsstýrinum, men ikki hvør , ið mest sleppur framat í loftmiðlunum! Tað eru longu nógv dømi um, at tað framvegis er Tjóðveldisflokkurin, sum framvegis hevur framíhjárœttin.

Sjónskast er, at Jógvan Arge framvegis er programmleiðari (gott nokk upp á hálva tíð, verður sagt) í útvarpinum og Leivur Hansen er tíðindamaður í Degi og Viku, báðir tjóðveldispolitikarar.

**Tjóðveldið framvegis framíhjárœtt**
Men eisini í sendingum kemur framíhjárœtturin til sjóndar. T.d. í kjaksendingini í SvF um fíggjarlógina, har Bárður Nielsen og Høgni Hoydal luttóku og í Føroyar í Dag í ÚF, har radarstøðin á Sornfelli var til viðgerðar. Í hesi sending var samrøða við allir flokkar, eitt umboð fyri hvønn flokkin, men tvey umboð fyri Tjóðveldisflokkin - Hergeir Nielsen og Finnbogi Ísaksson!

**Grundgevingin ósonn**
Ringdi til tíðindamannin og spurdi, hvussu hetta kundi bera til, og fekk at vita, at allir floksformennirnir, eisini formaðurin fyri Sambandsflokkin, høvdu víst á Finnboga Ísaksson sum serkønan!

Setti mœr fyri at eftirkanna, um hetta veruliga var so. Havi tosað við allar flokkarnar, og tað vísti seg, at tað er bert tann eini flokkurin, sum hevur peikað á Finnbog Ísaksson - hini umboðini vistu snøgt sagt als ikki av, at Finnbogi skuldi luttaka!

**Verða blakklistaðir!**
Havi mangan spurt politikarar, hví teir finna seg í, at almennu loftmiðlarnir sleppa at hóreiggja sœr soleiðis og allir svara teir, at finnast teir at útvarpi ella sjónvarpi, verða teir bara blakklistaðir!

**Fjølmiðlaábyrgdarlóg heldur í dag enn í morgin**
Men nú er tað ikki longur Tjóðveldisflokkurin, sum hevur mentamál og harvið ábyrgdina av loftmiðlunum, so vónandi verður fjølmiðlaábyrgdarlógin, sum er einasta vón fyri at koma óskilinum til lívs innan loftmiðlarnar, sett í gildi beinanvegin - heldur í dag enn í morgin!